

*Tá Western gjørdi kanningar á Loprafirði í fjør. Mynd Rógvi Johansen*

*Nøgdur og bjartskygdur Westernmaður:*

# Oljufeløgini eru væl nøgd við seismikkin

*Fleiri donsk feløg hava keypt seismiskt tilfar frá Western. Stórur áhugi er eisini fyri tilfarinum frá Lopraholinum . Frágreiðing um Lopraholið verður klár í hesi vikuni*

Hóast tað hevur tikið eitt sindur longri tíð enn ætlað og hóast tað hevur verið ivasamt, hvussu tað fór at vera at skjóta seismikk niður gjøgnum kiolometrar tjúkt basalt, so bendir nú alt á, at dygdin í tí seismiska tilfarinum er so mikið góð, at oljufeløgini eru væl nøgd.

Hetta upplýsir Gavin Hill Jones, marknaðar- og sølustjóri hjá Westernfyritøkuni fyri nyggj projekt í Vestureuropa.

Hann var her fyri í Føroyum fyri at kunna oljufyrisitingina um gongdina í seismisku kanningunum og at tosa um komandi kanningarnar, sum byrja umleið 1. mai.

Gavin Jones viðgongur, at tað hevur gingið eitt sindur seinni enn ætlað við viðgerðini av tilfarinum, og kemst hetta av trupulleikanum at "siggja" nóg væl niður gjøgnum basaltið.

Men teir hava so brúkt nógva orku til viðgerðina av tilfarinum.

–Eg haldi ikki eg sigi ov nógv, tá eg sigi, at oljufeløgini eru sera væl nøgd við tilfarið, sum tey nú tulka. Nógva staðni ber væl til at siggja strukturar undir basaltinum sigur Westernmaðurin, ið heldur fyri, at áhugin fyri tilfarinum er sera stórur millum oljufeløg.

Talan er um mong av teimum somu oljufeløgunum, sum hava fingið tillutað øki vestan fyri Hetland.

Feløgini eru úr nógvum ymsum londum, eitt nú eru fleiri feløg í Danmark, sum hava keypt tilfarið.



*Ein útlendskur seismikkserfrøðingur hevur á hesum korti peikað út fyri Sosialinum, hvar teir meta bestu møguleikar eru at finna olju við Føroyar*

**Lopraholið**

Gavin Jones vísir á, at teir í hesi vikuni verða liðnir við eina frágreiðing um kanningarnar av Lopraholinum.

–Hetta er áhugavert tilfar, sum føroyingar sjálvandi fáa alt fyri eitt. Og tey oljufeløg, sum vilja keypa meira enn 25% av hinum tilfarinum, fáa so eisini møguleika at keypa tilfarið frá Lopraholinum sigur hann.

Umframt seismisku kanningarnar til havs gjørdi Western í fjør eisini nakrar serstakar kanningar í sambandi við boriholið í Lopra.

Gavin Jones sigur, at hesar kanningar vísa, at har er okkurt áhugavert undir Lopraholinum. Hvat tað er ber bara til at siga við at bora.

Hann sigur, at nógv av oljufeløgunum hava keypt meira enn 25% av tilfarinum fyri nettup at fáa hendur á Loprakanningunum.

**Western og Geco**

Vit spurdu Gavin Jones, um føroyingar valdu rætt, tá Western fekk uppgávuna og ikki eitt felag sum Geco?

–Teir á Geco eru sera dugnaligir og hava eisini framkomna útgerð. Men eg haldi føroyingar valdu rætt, tá tit tóku av okkara tilboði. Eg trúgvi ikki, at Geco hevði gjørt eitt betri arbeiði enn vit gera nú.

Gavin Jones er fullvæl greiður yvir, at Geco hevur fingið stórar uppgávur stutt frá føroyska markinum. Hann sigur, at Western eisini hevur boðið upp á tær kanningar vestan fyri Hetland, sum Geco nú skal undir. Her er talan um sera framkomnar og dýrar 3D kanningar.

Uppá fyrispurning hví 3D kanningar ikki verða gjørdar á føroyskum øki sigur Gavin Jones, at hetta er ikki vanligt fyrr enn 2D kanningar eru gjørdar.

–Tað vit gera í føroyskum øki eru 2D seismikkur, og er tað at meta sum forarbeiði til tær meira framkomnu 3D kanningarnar. Eg rokni við, at oljufeløgini fara at umbiðja slíkar seismiskar kanningar, tá tey hava tulkað tað tilfarið, sum vit nú hava latið teimum.

Gavin Jones ivast í, um hetta verður fyrr enn fyrsta útbjóðingarumfarið er klárt á føroyskum øki.

Western fer so í gongd aftur at skjóta seismikk við Føroyar umleið 1. apríl. Tá kemur Western Atlas til Føroya.

Eftir eru umleið 7000 kilometrar at kanna og hetta arbeiði fer at taka einar 4-5 mánaðir.

jan